# Skóhornið – ein øðrvísi skóhandil




Í november í fjør lat skóhandilin Skóhornið upp í Bøgøtu 2 í Havn, og hetta fyrsta árið hevur roynst so væl, at eigarin, Axel Mc-Intosh, longu nú kennir seg vísan í, at handilin er komin fyri at verða, sum hann tekur til.

Skóhornið er ikki ein vanligur skóhandil. Axel Mc-Intosh sigur, at handilin keypir allar skógvarnar beinleiðis úr framleiðaralondunum og sostatt uttan um tey vanligu dýrkandi millumliðini. Hetta hevur eisini tann fyrimun, at handilin er ikki bundin av prísavtalum, sum aðrir skóhandlar ofta eru.

Skóhornið selir skógvar úr fleiri londum so sum Italia, Bretlandi, Fraklandi, Týsklandi, Eysturríki og úr Norðuramerika. Hetta eru bæði bíligir og dýrir skógvar, og fyrimunurin við beinleiðis innkeypi sæst serliga á prísinum á teimum dýraru skónum.

Millum tey kendu merkini hjá Skóhorninum er italska merkið Filento. Hendan verksmiðjan, sum ger skógvar til mannfólk, byrjaði longu í 1948 og hevur millum annað verið sponsorur hjá rally-koyraranum Michael Schumacher. Harumframt hevur Skóhornið enskar skógvar av merkinum Atom, og til kvinnurnar eru skógvar av kendu merkjunum Chix og Sally O'Hara.

Axel Mc-Intosh sigur, at Skóhornið leggur dent á at hava eitt annað úrval enn hinir skóhandlarnir í Føroyum, og at handilin skal vera kappingarførur í dygd og prísi. Sjálvur heldur hann, at try ungu í Føroyum fylgja væl við skómótanum.

JÓL Í MIÐBÝNUM

Mikudag koma jólamenn í býin á rossabaki, og Tórshavnar Ungdómshornorkestur spælir í Dr. Jakobsens gøtu kl. 18.

Børn úr Lítluskóg syngja í býnum kl. 19.

Leikhúsjól er kl. 18 og Jólakonsert er í Vesturkirkjuni kl. 20.

Hósdag syngur Cantabilé runt um í býnum og Knarkar spæla jólatónleik í Tinghúsgarðinum kl. 19.30.

Handlarnir hava opið til kl. 20.

Jólamenn vitja jólasmátturnar hvønn seinnapart, og í handlunum í miðbýnum.

Fleiri tiltøk á www.kunning.fo og www.torshavn.fo

KUNNINGARSTOVAN
Telefon 30 24 25













Slagorðið í INN
Altíð at hava vøruna, ið tær tørvar!

GOTT
BETRI
BÍLIGARI

opið frá 8.00 til 22.00

inn

Klaksvík · Norðskali · Tórshavn

